Føroya Náttúrugripasavn

## Skrivstovufólk til Føroya Náttúrugripasavn

Í sambandi við at okkara skrivstovufólk fer í annað starv, verður starvið hervið lýst leyst at søkja.

Føroya Náttúrugripasavn er stovnur undir Mentamálaráðnum og fevnir um Plantusavnið og Djórasavnið. Hesi søvn hava til endamáls at granska, savna, varðveita, handfara og sýna fram landsins náttúrusøguligu virði.

Viðkomandi skal taka sær av bókhaldi, journalisering og annars av vanligum skrivstovuarbeiði. Viðkomandi skal eisini kunna taka lut í øðrum arbeiði á Náttúrugripasavninum.

**Førleikakrøv**
Kravt verður at umsøkjarin hevur:

- Royndir í bókhaldi
- Góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
- Góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni
- Hevur umsøkjarin kunnleika til nýggju FSL-skipanina og starvsroyndir á økinum, er tað ein fyrimunur.

**Treytir**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum mugu vera Føroya Náttúrugripasavni í hendi í seinasta lagi 1. februar 2009.

Umsóknir skulu sendast til:

Føroya Náttúrugripasavn
V.U. Hammershaimbsgøta 13
100 Tórshavn

**Eru fyrispurningar um starvið – ringið til Náttúrugripasavnið á tlf. 352320 og tosið við Dorete Bloch, fyristøðufólk.**

# Dugnaligur tænari søkist

At byrja sum skjótast.
Áhugað biðjast ringja á tlf. 21 11 09

RESTAURANT TOSCANA

NÓLSOYAR PÁLS GØTA 13 · 100 TÓRSHAVN

TVØROYRAR KOMMUNA

## Avloysarastørv til Mýrifípuna í Trongisvági

Dagstovnurin Mýrifípan í Trongisvági, søkir eftir tímaløntum avloysarum, ið kunna avloysa á Barnagarðsstovunum og Útibarnagarðinum, tá tørvur er á tí. Starvið verður sett skjótast møguligt eftir 01. februar.

**Stovnslýsing:**
Mýrifípan er ein dagstovnur í Tvøroyrar Kommunu og samstarvskommununum í oynni. Stovnurin er skipaður í 5 eindir, vøggustova, 2 barnagarðsstovur, útibarnagarður og stuðulstoymið.

**Vit vænta av tær, at tú:**

- Hevur vilja og áhuga í at arbeiða við nógvum ymiskum børnum, í teirra foreldrum og nógvu ymisku starvfeløgunum.
- Hevur lætt við at umstilla teg eftir ymsum arbeiðsviðurskiftum
- Hevur góð samstarvsevnir
- Kanst arbeiða sjálvsstøðugt
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Tímir væl at verða úti; hevur virðing fyri náttúruni

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambart sáttmálað millum Føroya Pedagogfelag og KAF

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 – 18.00

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Guðruna Petersen, leiðara á tlf 372700

**Umsókn:**
Umsókn, saman við møguligum viðmælum, skal sendast til Dagstovnin Mýrifípan, Smærugøta 8, FO 826 Trongisvágur, innan 01.02.2009.

umhvørvisstovan
ENVIRONMENTAL AGENCY

## ÍBÚÐ

Søkt verður eftir íbúð til eitt av okkara starvsfólki til 1. mars 2009

**Umhvørvisstovan**
Boks 2048 · Tlf. 342400
FO-165 Argir · us@us.fo
www.us.fo

# Sands Útróðrarfelag

hevur aðalfund 25. januar kl. 17.00 á Munkinum

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

## Sethús og stórt grundøki Yviri við Strond 57

Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 659 a, Tórshavn, seld.

Talan er um eina serstaka ogn, ið liggur ógvuliga væl fyri við fríum útsýni yvir fjørðin og Nólsoynna. Partur av grundøkinum er plantað við m.a. stórum trøum. Økið omanfyri húsini er bøur. Umframt sethúsini er á økinum hjallur og gamalt fjós við laðaðari grund.

Grundøkið er 3.057 m².

Húsini, sum eru bygd í 1956, eru í tveimum hæddum, hvør 136 m², alt innrættað. Í erva: Gangir, baðiverilsi, køkur, tvær stovur, hjúnarúm, og trý kømur. Í kømrum og gangi eru innbygd skáp. Kjallari: Gangir, stór stova, trý kømur, wc/brúsa, fýrrúm, vaskikjallari, kjallararúm og goymsla. Fleiri innbygd skáp eru í niðaru hæddini.

Prísuppskot: kr. 2.500.000,00

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO




# Volvo S40 til sølu

*– økonomiskur luksusbilur*

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin við 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 33.000 km. Hevur ljósagrá leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/alu, alu-panelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, niðurbl. bakkspegl v/kumpass, klimaanlegg, innbygd barnasetur aftan o.m.a. Í sera góðum standi. Hevur bert havt 1 eigara.

Eyka felgur við Goodyear Ultra Grip 7 vetrardekkum fylgja við.

**Áhugaði kunnu ringja 21 19 96 ella senda ein t-post til kho@post.olivant.fo**